# Vælkomin í Miðbýin, Sosialurin

**Á móttøkuni hjá Sosialinum í nýggja Miðlahúsinum í Vágsbotni fríggjadagin bar Heðin Mortensen fram heilsan frá Tórshavnar Býráð og handaði Miðlahúsinum tvey trø, sum nú prýða bakgarðin hjá Miðlahúsinum**



*Heðin Mortensen, borgarstjóri, bjóðaði Sosialinuum vælkomnum í miðbýin*

NÝTT MIÐLAHÚS

– Tá ið tað fyri nøkrum mánaðum síðani fræofficiellttist, at handilin hjá Valdemar Lützen her í Vágsbotni skuldi steingja, vóru vit nógv sum hugsaðu: Tað kann ikki passa! Tað ber ikki til! Tí handilin hjá Valdemar hevur - saman við hinum handlunum her í Vágsbotni, verið ímyndin av handilslívinum í Vágsbotni alla okkara tíð. Fyritøkan kundi jú halda 100 ára stovningardag um hetta mundið, tá ið tíðindi um, at Valdemar gavst, fóru at ganga um býin, segði Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn m .a. í røðu síni á móttøkuni hjá Sosialinum í Miðlahúsinum í Vágsbotni fríggjadagin.

– Satt at siga trúði eg ongantíð, at so var, óivað høvdu tey onkrar aðrar ætlanir við húsunum.

Men tá ið tað so seinni kom upp, at Sosialurin hevði ætlanir um leiga seg inn her, bleiv eg ikki minni kløkkur, og hugsaði: Nei, nú er Jan blivin ørur í høvdinum.

Men sum tíðin er fráliðin, og vit hava hoyrt meiri um ætlanirnar og visiónirnar hjá Sosialinum, ja so mugu vit staðfesta, at henda verkætlanin er væl fyrireikað.

Her er brotið upp úr nýggjum í føroyska fjølmiðlaheiminum, og eg ivist onga løtu í, at blaðleiðslan hevur tikið rætta avgerð.

Sjálvandi skal ein redaktión og eitt blaðhús - ja, nú eitur tað eitt MIÐLAHÚS verða har, ið fólkið og virksemi er.

Vit, ið hava okkara dagligu gongd her í miðbýnum, fegnast um, at hava fingið ein so kreativan og virkisfýsnan granna, og eg ivist onga løtu í, at tit fara at skapa eitt stórt virksemi her í miðbýnum. Og tað frøir okkum í býráðnum.

Her í Tórsgøtu og í Vágsbotni er eitt virkið mentanar- og handilslív við at taka seg upp. Her vil sum fráliður koma eitt livandi, spennandi og fjølbroytt umhvørvi.

Í umhvørvinum eru komnar fleiri matstovur, skrivstovur og handlar.

Tjóðpallur Føroya er í gøtuni - Vit hava Tilhaldið og Margarinfabrikkina, har tey ungu halda til. Vit hava Sjómansheimið og umsitingina hjá kommununi - Havnar Hornorkestur hevur eisini venjingarhølið í grannalagnum. Og vit hava nógv, nógv annað og fjølbroytt virksemi her.

Nærmasti grannin - Reinsaríið, sum kommunan hevur ognað sær, er í dag ikki nakað serligt prýði, men nú verður arbeitt við at seta tað í stand, soleiðis, at um ikki so langa tíð kemur aftur til heiður og æru. Ikki sum Reinsarí, men heldur sum eitt hús, við nógvum virksemi og lívi.

Í gamla posthúsinum, har Snarskivan er, arbeiða handverkarar í hesum døgum við fullari megi at innrætta eina matstovu, sum starvsfólkið hjá kommununi skal brúka. Men ætlanin er eisini, at onnur skulu kunnu brúka matstovuna.

– Býráðið vil fegið markera, at vit í dag alment hava fingið ein nýggjan granna. Vanligt er at koma við eini gávu, tá ið ein verður bjóðaður í hátíðarhald. Men vit vita øll, at tað ikki altíð er lætt at finna uppá.

Tá var tað, at onkur kom at hugsa um, at fyri nøkrum árum síðani hugleiddi Jan í einum ólavsøkublaðnum hjá Sosialinum um urtagarðarnar í miðbýnum.

So, hví ikki eitt træ???

Symbolikkurin við hesi gávu er eyðsýndur.

Og lat okkum vóna, at trøini koma seg væl og verða eitt prýði í garðinum, til gleði og gagns fyri øll.

Talan er um tvey trø - eitt ovidia og eitt banksia træ.

– Annað er úr so fjarskotnum landi sum Suðuramerika, og hitt úr einum ikki minni fjarskotnum landi - úr Tasmania. Og hvør veit? Tá krúnprinsessen kemur til Føroya í summar liggur leiðin fram við her – so hvør veit? Kanska søkkur hon innum at hyggja eftir trænum úr heimlandinum?

Trøini eru frá Skógrøkt Landsins, og eru komin til Føroya fyri 13 árum síðani, sum heilt smáar plantur.

Tey eru sera sjáldsom, og mett verður, at her í Vágsbotni er gott at gróðurseta tey, tí ovari í býnum, har tey hava staðið, hevur verið heldur kalt.

Ynski mítt skal verða at hetta nýbrotið hjá Sosialinum fer at eydnast væl, og fari eg at bera fram øll góð ynski fyri Miðlahúsið, segði Heðin Mortensen, borgarstjóri.

# Sosialurin komin aftur til Havnar

**Fríggjadagin upprann so dagurin, har Sosialurin alment kundi lata dyrnar upp í nýinnrættaðu miðlahúsinum í Vágsbotni í Havn, har hópin av fólki nýtti høvi at støkka inn á gólvið. Seinastu 23 árini hevur Sosialurin havt til húsa á Argjum**

NÝTT MIÐLAHÚS

*Eirikur Lindenskov*

Tað var seint síðsta summar, at vit á blaðnum fingu áhuga fyri handilshúsunum hjá P/F Valdemar Lützen í Vágsbotni, sum vórðu lýst til leigu, eftir at Valdemar hevði handlað har í meiri enn hálva øld.

Í november varð farið í gongd við umvælingar- og umbyggingararbeiðið _ og næstsíðsta vikuskiftið var klárt hjá Sosialinum at flyta inn í nýggju hølini.

Fyri 23 árum síðani flutti Sosialurin annars úr Havnini og út á Argjar. Tá hevði blaðið húsast undir trongum umstøðum, fyrst á Heygsbreyt í Havn, har Einars Offsett er og seinnapartin av sjeytiárunum í einum sethúsum í Sjúrðargøtu 9. Hetta tíðarskeiðið varð Sosialurin prentaður á prentsmiðju Dimmalættingar, og blaðið kom út tvær ferðir um vikuna. Tá hølisviðurskiftini í Sjúrðargøtu gjørdust heldur frægari enn á Heygsbreyt, vóru eisini fleiri blaðfólk sett í fast starv, og blaðið mentist frá at verða eitt floksblað meira til eitt tíðindablað. Ynski var um at fáa blaðið út oftari, men tá Dimmalætting ikki segði seg hava orku til at prenta blaðið tríggjar ferðir um vikuna, fóru menn at hugsa um at keypa egna prentsmiðju. Og til tess mátti blaðið hava størri høli.

Endin varð, at húsini hjá Jákupi á Lag úti á Argjum vóru keypt. Húsini høvdu staðið í gerð í nógv ár, men vórðu tá innilokað, so Sosialurin kundi innrætta tey eftir tørvi. Kjallarin var so grivin longur niður, so pláss var fyri prentsmiðjuni, meðan ovasta hæddin varð innrættað til Sosialin. Miðhæddin varð leigað út. Har hevði Smæran ein matvøruhandil og Kári Olsen ein part til Bókavirkið.



*Jan Müller bjóðar gestunum vælkomnum á móttøkuni í nýggju miðlahúsinum í Vágsbotni fríggjadagin*

Nú vóru umstøðurnar sera góðar, og blaðið kom beinanvegin frá byrjan út tríggjar ferðir um vikuna. Fyrsta blaðið kom av prentsmiðjuni á Argjum tíðliga í mars í 1982.

Men nógv er hent síðani 1982 - og blaðframleiðslan kann í dag als ikki samanberst við tað, hon var í 1982. Tá varð alt tilfarið skrivað á skrivimaskinu og síðani lagt til setingar. Setifólkini settu so tekstin umaftur, koyrdu sats út, sum síðani varð kliptur og klistaraður upp á síðurnar, sum síðani vóru avfotograferaðar.

Í dag er tilgongdin so nógv øðrvísi, og krumtappurin í framleiðsluni er teldan. Sosialurin og Dimmalætting hava í dag felags prentsmiðju, nevnd Prentmiðstøðin, sum leigar seg inn í prenthøllina hjá Dimmalætting. Prentsmiðjan hjá Sosialinum úti á Argjum er tikin niður, og bestu maskinurnar settar upp í høllini hjá Prentmiðstøðini. Í dag fer alt arbeiðið fram á teldu, øll myndaviðgerð er á teldu, og blaðið verður umvegis telduna sent úr Vágsbotni niðan á Prentmiðstøðina, sum prentar blaðið og ber tað út til flestu haldararnar eisini.